# Frá olju- til orkuhøvuðsstað

Sigur tú orðið »Stavanger«, sigur tú samstundis olja. Hetta heitið ynskir netverkið »Fornybar Stavanger« sum ynskir at gera sítt til, at býurin kann fáa heitið sum altjóða orkuhøvuðsstaður. - Verða kreftirnar nýttar eins væl, sum tá oljan kom í land á sinni, kann hetta gerast ein eins stór succes, verður sagt. Víst verður á, at danir gera nógv burtur úr vindmyllum sínum og bretar við endurvinning av orku úr havinum. Her eigur Stavanger at gerast oddafiskur, tá talan er um grønar verkætlanir.



# Gjaldskortið í handlunum

Tá ein fer til handils í Stavanger og hevur gjaldskort at gjalda við, kann tað vera ein fyrimunur at spyrja seg fyri, um gjaldsterminalurin í handlinum kann taka ímóti DK VISA kortunum, sum tey flestu í Føroyum nýta at gjalda við. Tað eru nevniliga ikki allir handlarnir sum gera tað. Tað er tó eingin trupulleiki at taka pengar út við DK VISA-kortunum í peningaautomatunum, sum tað eru nógvar av í býnum. So tað kann vera ein fyrimunur at hava kontantan pening, um handilin ikki tekur ímóti gjaldskortinum


























